

# fest við Kim Wilde

**Hendi nógv**

Í 1988 var Kim Wilde á konsertferð við Michael Jackson, sum var poppkongur í heiminum júst tá.

- Tað var ein áhugaverd tíð. Eg hitaði upp fyri hann til nógvar konsertir á hansara Bad-konsertferð, og eg lærdi nógv av at síggja hann upptraðka.

- Tað kundi verða sera trupult hjá mær at fara á pallin frammanfyri hansara áhoyrarum og so nógvum áhoyrarum, við hvørt vóru tað fleiri hundraðtúsund fólk, og tey flestu vóru komin fyri at síggja og hoyra Michael Jackson. Eg noyddist at læra meg, hvussu eg kundi fáa eina slíka áhoyrarafjøld við mær. Tað var læruríkt fyri mínar konsertframførslur, sigur Kim Wilde.

**Tók seg úr tónleiki**

Fyri fáum árum síðani fór Kim Wilde aftur at spæla til konsertir, men tá hevði hon verið buturi frá tónleikinum í eini 10 ár.

- Eftir at eg hevði havt míni hitt, snúði tað seg altíð um at skriva og spæla næsta sangin, sum kundi gerast eitt hitt, og tað kundi til tíðir verða strævið – bæði fyri tey, sum skrivaðu sangirnar, og fyri meg, sum skuldi syngja teir.

- Tað lá trýst á okkum um at levera allatíðina, og eg haldi, at vit kláraðu tað heilt væl. Eg hevði nógvar stakfløgur, sum kláraðu seg væl, og fløguútgávurnar seldu eisini væl. Men tað fekk eisini ein enda, og eg haldi, at hevði nátt langt, tá ið eg valdi at gevast við tónleikinum, bleiv gift og fekk familju.

Hetta var fyri meira enn 10 árum síðani, og hon hevur hesi árini fingist nógv havar og blómur, og millum annað hevur hon verið vertur í sending hjá BBC.

- Eg fór í skúla fyri at læra um plantur, og eg havi fingist nógv við tað seinnu árini. Eg geri tað framvegis, men nú havi eg spælt meira tónleik aftur. Eg kenni á mær, sum at eg tími betur at spæla tónleik aftur, og tað er serliga stuttligt at spæla konsertir.

- Eg var blivin eitt sindur kedd av tí heila, og eg gav meira ella minni tónleikin upp. Eg hevði brúk fyri onkrum øðrum í míni lívi, men nú havi eg av álvara fingið hug til tónleik aftur. Eg havi spælt aftur kring Europa, og tað hevur verið ein stór uppliving.

**Føroyar**

Og nú kemur Kim Wilde fyri fyrstu ferð til Føroya at spæla. Hennara tónleikur hevur verið sera væl umtóktur í Føroyum, og nú fáa føroyingar møguleikan at hoyra ensku songkvinnuna live.

- Eg gleði meg til at uppliva Føroyar. Eg havi hugt eftir myndum av Føroyum á internetinum, og eg má siga, at tað er eitt vakurt land. Tit hava tykkara egnu mentan og egið mál, og nú gleði eg meg bara til at koma til landið og uppliva tað sjálv.

- Eg fari at spæla allar sangirnar, sum fólk kenna. Eg havi eisini onkrar einstakar nýggjar sangir frá seinastu útgávuni hjá mær. Eg havi ein bólk við mær. Tað eru ungir og góðir tónleikarar, so tað verður lív í. Fólk fara við vissu at hugna sær, lovar Kim Wilde.

**HITTINI**

Kids In America
You Keep Me Hangin' On
You Came
Water On Glass
View From A Bridge
Cambodia
Chequered Love
Four Letter Word
Never Trust A Stranger